# Bøðilin í Beslan deyður

**Sjamil Basayev skipaði fyri gíslatøkunum á skúlanum í Beslan og í Dubrovka-leikhúsinum í Moskva. Nú er uppreistrarleiðarin deyður.**

RUSSLAND
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

-Hann fekk ta revsing, hann hevði uppiborið, segði Vladimir Putin, forseti, tá hann frætti tíðindini um, at kekenski uppreistrar-leiðarin Sjamil Basayev var deyður.

Upprunaligu vildi ein talsmaður hjá kekensku uppreistrarmonnunum vera við, at Basayev doyði, tá ein bumba brast av misgáum í bili hansara, men tað avsannaðu russisku myndugleikarnir beinanvegin.

Interfax og Reuerts skrivaðu í gjárkvøldið, at Nikolaj Patrushev, sum er ovasti í russisku tryggdartænastuni, hevði kunnað Vladimir Putin, forseta um, at trygdarhermenn vóru komnir fram á Basayev í Ingusjetia, og at teir høvdu beint fyri honum og fleiri øðrum uppreistrarmonnum.

-Hetta er ein hóskandi revsing til brotsmenninar, sum myrdu okkara børn í Beslan og Budnnovsk, og sum framdu fleiri atsóknir í Moskva og aðrastaðni í Russlandi, segði Putin við sjónvarpið.

Sjamil Basayev var tann hernaðarligi leiðarin hjá teimum kekensku uppreistrar- og loysingarmonnunum. Hann var ímyndin hjá teimum mest víðgongdu, og hann gjørdi átrúnaðin til ein part av stríðnum við russar, sum ikki vildu hoyra talan um at tingast við hann.

Eygleiðarar, sum hava fylgt við stríðnum í kekenia, siga, at tað fær neyvan nakra stórvegis ávirkan á kekenska uppreisturin, at Basayev er deyður. Tað sama siga talsmenn hjá uppreistrarmonnunum.

-Vit hava ungar kreftir, sum eru til reiðar at taka við, segði ein av talsmonnunum við Reuters í gjárkvøldið.

### FAKTA

* Sjamil Basayev hevur elingi verið ein av fremstu kekensku leiðarunum í bardaganum við russar, og hansara áskoðan var, at allir russar, eisini børn, vóru lóglig mál í bardaganum.

* Basayev gjørdist kendur í 1995, tá hann skipaði fyri álopinum á eitt sjúkrahús í russiska býnum Budennovsk. Meiri enn 150 fólk lógu eftirá.

* Í oktober í 2002 sendi Basayev 41 uppreistrarmenn inn í Dubrovka-leikhúsið í Moskva, har teir tóku umleið 800 gíslar. Atsóknin kostaði øllum álopsmonnunum og 126 gíslum lívið.

* Basayev átók sær eisini ábyrgdina av atsóknini at einum skúla í russiska býnum Beslan í 2004, har meiri enn 1.000 børn og vaksin vórðu tikin gíslar. Atsóknin kostaði 330 teirra lívið. Tey flestu vóru børn.

» *-Hann fekk ta revsing, hann hevði uppiborið! (Vladimir Putin, forseti, um deyða Basayev's).*



*Sjamil Basayev.*

# Ætla at steðga streyminum

**Átøk ímóti fátækradømi skulu avmarka flóttafólkastreymin um Miðjarðarhavið.**

FLÓTRTAFÓLK
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Á hvørjum ári koma umleið 600.000 fólk ólógliga úr Afrika til Evropa, og minst 2.000 fólk doyggja á vegnum um Miðjarðarhavið ella Atlantshavið.

Nú skal okkurt gerast fyri tálma streyminum, og teir seinastu dagarnar hava ráðharrar úr umleið 60 londum umrøtt støðuna á fundi í Marokko. Har var semja um, at tað ræður fyrst og fremst at bøta um fátækradømið í teimum vesturafrikonsku londunum so sum Mauritania og Senegal, so fólk kunnu støðast har heldur enn at leita til Evropa.

ES hevur í fyrsta umfari lovað eina hálva milliard krónur til endamálið, og Spania hevur harumframt játtað 75 milliónir krónur í íverksetarastuðuli. Harumframt eru ES-londini sinnað at bera so í bandi, at flóttafólk, sum longu eru í Evropa, kunnu fáa okkurt at venda heimaftur til.

# Meiri olju úr Murmansk

Russisku oljufeløgini Rosneft og Lukoil ætla at flyta munandi meiri olju ígjøgnum Kolanesi til avskipingar í Murmansk, og tað fer at hava við sær, at russar fara at flyta munandi meiri olju fram við norðurnorsku strondini enn nú, skrivar Aftenposten.

Sambært upplýsingunum ætla tey bæði feløgini at økja framleiðsluna á Kolanesinum, sum hon verður 12 milliónir tunnur um árið, og tað er næstan fýra ferðir meiri, enn framleiðslan var í fjør. Endalig avgerð er tó ikki tikin enn, men feløgini ætla at koma til eina semju í heyst, skrivar Aftenposten.

Norski umhvørvisverndarfelagsskapurin Bellona er alt annað enn fegin um russisku ætlaninar. Bellona sigur, at tann stóri russiski oljuflutningurin fer at hava við sær, at fimm risastór tangaskip fara at sigla fram við norðurnorsku strondini um vikuna. Felagsskapurin hevur fyrr víst á, at tað kann fáa sera álvarssamar avleiðingar fyri fiskiríkidømið í Barentshavinum, um leki kemur á eitt av teimum stóru tangaskipunum.

# Pólendingar óttast tvíburðar

Nógvir pólendingar eru misnøgdir við, at Lech Kacynski, forseti, hevur sett tvíburðarbróður sín, Jaroslav Kacynski, í embætið sum landsins forsætisráðharri. Tað gjørdi forsetin, tá stjórnin hjá Kazimerz Marcinkiewicz bað um at sleppa frá. Enn hevur Jaroslav Kacynski ikki skipað stjórn, men um fjúrtan dagar fer hann ætlandi at biðja tjóðartingið góðkenna ta nýggju stjórnina.

Nógvir pólendingar vísa á, at teir báðir brøðurnir hava ongar uttanríkispolitiskar royndir, og at tað kann fara at skaða umdømi landsins uttanlands. Teir hava heldur ongar búsksparpolitiskar royndir, og báðir eru kendir fyri at hava sera tjóðskaparlig sjónarmið.

Ein meiningakanning avdúkar eisini, at flestu pólendingar eru ímóti, at tveir brøður manna forseta- og forsætisráðharraembætið. 60 prosent siga, at tað er óheppið at savna alt vald hjá tveimum brøðrum, og bara 21 prosent vænta, at teir fara at gera eitt gott arbeiði fyri landið og fólkið.

# Biskupur stríðist fyri hítum




-Vit mugu koma burtur frá teirri gomlu uppfatanini, sum sigur, at hjúnarlagið verjir kvinnuna ímóti eyðkvæmi og øðrum slíkum sjúkum, sigur fyrrverandi biskupurin í Oslo, Gunnar Stålseth.

Hann vísir á, at kvinnurnar eru teir størstu tapararnir í londunum sunnan fyri Sahara, og at helmingurin av kvinnunum har, sum hava eyðkvæmi, hava fingið smittuna frá sínum egnu monnum. Tí noyðast vit at ásanna, at hjúnarlagið verjir ikki kvinnuna ímóti smittu, sigur fyrrverandi Oslo-biskupurin.

Gunnar Stålseth er ráðgevi hjá Neyðhjálp Fólkakirkjunnar og ein av leiðarunum á einari altjóða ráðstevnu, sum skal viðgera ymsar spurningar í sambandi við eyðkvæmi. Har fer at royna at fáa átrúnaðarleiðarar at góðtaka, at hítin verður ein náttúrligur partur av hjúnarlagnum.

Gunnar Stålseth sigur við NTB, at hann er ikki sørt vónsvikin av, at tann katólska kirkjan er ímóti, at giftir menn brúka hít. Hann uggar seg tó við, at pávin hevur ikki sagt sína hugsan um evnið, og at tað tí kanska ber til at ávirka ta katólsku kirkjuna.